# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Petur Weihe Dalsgaard:

## PH.D - ari í organiskari kemi



17. mai í ár vardi Petur Weihe Dalsgaard PH.D-ritgerð sína í organiskari kemi á Københavns Universitet.

Petur, ið frammanundan er útbúgvin farmaceutur frá Dansk Farmaceutisk Højskole, hevur seinastu 3 árini granskað í at vinna heilivág úr penicillinsoppum, ið liva í harðførum og køldum økjum. Ein part av tíðini hevur hann granskað á universitetinum í Christchurch í New Zealandi.

Úrslitið av granskingini varð framlagt á enskum. Dentur var lagdur á, at tann mest framkomna teldutøknin er nýtt í arbeiðinum, víst varð á, at við hesi tøknini ber til óvanliga skjótt at finna tey ávísu evnini at nýta í heilivági.

Ein opponentur var frá universitetinum í IOWA og ein frá medisinalfyritøkuni Novo Nordisk.

Í sambandi við hesa gransking eru 6 vísindaligar greinar góðkendar í altjóða tíðarritum.

Petur er úr Tórshavn, er 30 ára gamal, og býr í Keypmannahavn.

Felagið Føroysk Verkætlanarleiðsla:

## Nývalda nevndin skipað seg

Føroysk Verkætlanarleiðsla, felag fyri fólk, sum arbeiða við verkætlanarleiðslu í Føroyum, varð stovnað í Havn mikudagin 18. mai. Føroyska felagið er deild av donskum landsfelag.

Í fyrstu nevndina komu Árni Jakobsen, umboðandi verkfrøðingafelagið Sofus M. Jakobsen, Kári Dal-Christiansen, Føroya Tele, og Regin V. Dalsgaard, Isuus Mobil, Sigurd Lamhauge, Norðoyartunnilin, og Súni Christiansen, Landsverk. Nevndin skipaði seg við Árna Jakobsen sum formanni.



*Nevndin í felagnum Føroysk Verkætlanarleiðsla, f.v.: Regin V. Dalsgaard, Súni Christiansen, Sigurd Lamhauge, Árni Jakobsen, og Kári Dal-Christiansen*

*Mynd: Føroya Tele*

Føroya Pedagogfelag:

## Nevndin skipað seg

**Á aðalfundi í Føroya Pedagogfelag 23. apríl vóru tveir nýggir nevndarlimir valdir. Teir eru Rógvi Fossádal og Jógvan Philbrow**

**Tíðindaskriv**



*Aftast f.v.: Maud Wang Hansen og Rógvi Fossádal. Fremst f.v.: Jógvan Philbrow, Laila Petersen og Jarvin Feilberg Hansen.*

*Mynd: Rit&Ráð*

Jarvin Feilberg Hansen, sum ikki stóð fyri valið, heldur fram sum formaður. Annars hevur nevndin skipað seg soleiðis: Maud Wang Hansen, næstformaður, Laila Petersen, skrivari, Rógvi Fossádal, kassameistari og Jógvan Philbrow, nevndarlimir. Eykalimir eru Annika Djurhuus, Anja Egholm og Birita Lambaa.

**Dagurin**

**27. mai. Lucianus**, deyður umleið ár 200. Saman við fleiri øðrum tikin av døgum um Svartahavsleiðina. Kristian Osvald Viderø varð føddur hendan dagin í 1906.

## Heilsan til Sigrun Smith



Góða mamma, vermamma og omma,
tú sært ung út, sum ein blomma,
vit eina heilsu vilja tær senda,
nú tú á flatlondum vilt lenda,
til lukku við teim áttati,
vit vildu staðið tær við lið,
men ikki vart tú inni,
tó - altíð glað og løtt í sinni,
tøkk fyri mong góð minni,
tøkk fyri kærleik' og umsorgan tína.
Vit biðja, at Harrin má senda tær signing Sína.

**Eli, Brita, Napoleon, Líggjas, Anna og Sigrun**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá ið góði pápi, maður, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Knút Joensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest fyri góð og troystarrík orð.
Takk til sangarar og kirkjutænarar og tykkum, ið hjálptu so væl til ervið.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Herbergið.
Takk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kathrina, Jákup og Grækaris**

†

Kunngjørt verður at

**Elin Zachariassen**
úr Streymnesi – ættað úr Nólsoy

andaðist 25 mai, 75 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju leygardagin kl. 14.00.
Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*
**Maður og børn við familjum**

Tey, ið vilja lata blómur ella krans kunnu ístaðin lata eina gávu til Sambýlið í Kollafirði, konto í Føroya Sparikasssa.